# GÓÐ TÍÐINDI

Alt orð Títt samanlagt er sannleiki, og til ævigar tíðir stendur øll rættvísilóg Tín føst.
Sálmur 119.160

NR. 3 / NOV 2023 / ÁRGANGUR 32

## Nýggju klæðir keisarans (eftir Etu Linnemann)

Eta Linnemann (1926-2009), dr.theol., fór sum ung at lesa gudfrøði við tí endamáli at læra orð Guds betur at kenna. Hon las undir so navnframum søgukritiskum gudfrøðingum sum Rudolf Bultmann og Ernst Fuchs.

**Í bókini – sum á norskum hevur heitið „GUDS ORD og bibelkritikken", og sum snýr seg um søgukritisku gudfrøðina, ið hevur fingið atgongd til kirkjur og samkomur, og sum er við til at gera orð Guds til einkis – sigur Eta Linnemann í vitnisburði sínum:**

Uppgáva mín er tann sama sum hjá piltinum í *Nýggju klæðum keisarans*. Hann rópti, at keisarin var í ongum klæðum. Eg sigi tað sama um søgukritisku gudfrøðina. Hon sigur seg vera *vísindaliga gudfrøði*, men hon er als ikki vísindalig!

Tá ið eg sum professari undirvísti í søgukritiskari gudfrøði, trúði eg fult og fast tí, eg undirvísti í. Tað geri eg ikki í dag, tí eg havi sannroynt, at søgukritiska gudfrøðin tænir ikki sannleikanum og evangeliinum. Hon er ikki vísindalig, soleiðis sum henni dámar at verða uppfatað.

Uppgerð mín við ta søgukritisku gudfrøðina er ein vitborin uppgerð. Men hon er eisini ein andalig uppgerð. *Nei* mítt til ta søgukritisku gudfrøðina er úrslit av *ja* mínum til undurfulla Harra og Frelsara mín, Jesus Kristus, og til dýrdarríku endurloysingina, ið Hann vann mær á Golgata.

### Næmingurin fall frá

Tá ið eg fyri nú mongum árum síðan fór undir at lesa gudfrøði í Marburg í Týsklandi – kanska kendasta teologiska læruplássið – hevði eg nýliga tikið ímóti Jesusi. Men av tí at mær tørvaði upplæring út frá Bíbliuni, søkti eg gudfrøðilesturin í tí trúgv, at har fór eg at fáa upplæring. Eg sat so har og lýddi á lærararnar – uttan at kenna mótvilja – og legði mær eina við at læra tað, ið teir søgdu frá.

So við og við var trúgvin pilkað úr mær. Eg skuldi millum annað lesa kendu bók Rudolf Bultmanns um tær *synoptisku traditiónirnar*. Henda bókin viðger, hvussu tey trý fyrstu evangeliini skulu vera vorðin til.

Í hesi bókini sigur Bultmann, at jólaevangeliið er íspunnið fyri at loysa trupulleikan, at Jesus átti at verið føddur í Betlehem. Hann varð hildin at vera Messias, og sambært profetiunum skuldi Messias verða føddur í Betlehem. Bultmann helt seg tó vita, at Jesus var føddur í Nazaret. Tað skuldi vera greitt út frá tí, at hann varð kallaður Jesus úr Nazaret.

Fyri ein lesandi kennist tað, sum teir kendu professararnir siga, at vera eftirfarandi. Vit svølgdu tí rátt, hóast eg mintist jólaprædikuna í kirkjuni heima.

Tað var beint eftir kríggið, og Týskland var í sorli. Fyri at ugga mongu flóttafólkini segði presturin, at Jesus hevði eisini verið flóttafólk einaferð. Hann fataði jólaevangeliið sum eina sanna søgu. Eg skilti ikki, at hann, sum eisini hevði lisið gudfrøði, kundi tala so ... Av tí at hann hevði lisið gudfrøði, mátti hann hava lisið bókina hjá Bultmann. Hann átti tí eisini at vita tað sama sum eg, at jólaevangeliið var smíðað av Lukasi fyri at loysa ein teologiskan trupulleika. Hvussu kundi hann so prædika, sum um tað veruliga var farið fram?

Í neyð míni fór eg til næmingaprestin. Men har var lítil hjálp at heinta. Hann royndi bert at greiða mær frá, at tað finnast tvey sløg av sannleika. Annað snýr seg um, at okkurt er veruliga hent, og at tað er ein veruleiki. Men einans børn kunnu skilja hetta slagið av sannleika. Tá ið tey spyrja, um ein frásøgn er sonn, vilja tey hava staðfest, at hon veruliga er farin fram. Um ikki, er hon ikki sonn, siga tey.

Næmingapresturin greiddi víðari frá, at tey vaksnu eru komin longri, og at tey eisini eru før fyri at skilja hitt slagið av sannleika. Sambært hesum slagnum av sannleika kunnu enntá ævintýr vera sonn – skilt á tann hátt – at tey kunnu læra okkum okkurt.

Á henda hátt seta søgukritisku gudfrøðingarnir sannleika Bíbliunnar javnbjóðis við sannleikan í ævintýrunum, og tað gjørdi eg eisini.



### Trúgv eins og tongul í brimi

Tí er heldur ikki løgið, at tey, sum hava eina kristna trúgv, sum er sermerkt av søgukritisku gudfrøðini, hava eina trúgv, ið best kann samanberast við tongul í brimi. Slík trúgv rekur aftur og fram við streyminum og manglar fastan grundvøll.

Men grundvøllurin undir trúgv okkara er ikki óstøðugur. Vit hava óvikandi orð Guds, sum vit í øllum lutum kunnu hava fult og fast álit á. Tí nýtist trúgv okkara heldur ikki at vera sum tongul í brimi.

Søgukritiska gudfrøðin er einki annað enn synd. Náði og trúfesti Guds fyri at takka varð eg leidd burtur úr henni. Gud vísti mær, at henda gudfrøðin kundi ómøguliga koma fram til sannleikan við granskan síni. Hetta var mær ein stórur skelkur, tí tað var leitanin eftir sannleikanum, sum hevði verið drívmegin í lívi mínum heilt frá barni av.

Næsti skelkurin kom, tá ið Gud vísti mær, at søgukritiska gudfrøðin hvørki veitir prædikuni ella evangeliinum nakra hjálp. Hvat var so endamálið við øllum hesum?

### Ímyndað gudstænasta

Søgukritisku gudfrøðingarnir halda ikki, at teir eru kirkjuni at skaða. Teir halda tvørturímóti, at teir gera Gudi eina tænastu við

at boða eina trúgv, sum teir halda hóskar til okkara øld. Teir halda veruliga, at søgukritiska gudfrøðin er neyðug, fyri at nútíðarmenniskjað skal kunna trúgva.

Ein kendur gudfrøðingur segði beinleiðis einaferð, at í dag er neyðugt við einum ávísum *intelligensi* fyri at kunna gerast kristin. – Neyðugt var, at tú hevði innlit í úrslitini hjá søgukritisku gudfrøðini.

Eg hugsaði eisini soleiðis. Men ólagið, ið nú kom í, hevði við sær, at eg steðgaði upp í arbeiðinum. Men Gud ætlaði tað ikki so. Hann hevði í huga at loysa meg úr bondum søgukritisku gudfrøðinnar.

## Áhaldandi bøn

Hann nýtti næmingar mínar, ið vóru endurføddir trúgvandi. Nakrir teirra hildu vón vera fyri mær og fóru undir at biðja fyri mær. Teir fingu eisini familjur sínar at biðja fyri mær, og tey bóru meg fram fyri Gud á bønafundum sínum. Seinni havi eg frætt frá meiri enn 100 fólkum, at tey vóru við til at biðja fyri mær í hesum tíðarskeiði.

Ein av næmingunum beyð mær eisini til ein kristiligan fund. Fyrsta innbjóðingin kom í mai 1976. Eg segði nei takk. Hvønn mánað kom aftur ein innbjóðing, men eg segði nei hvørja ferð. Til í oktober. Tá fór eg við, og hetta var sættu ferð, at eg varð boðin. – Tað er av stórum týdningi, at trúgvandi ikki gevast at bjóða øðrum við sær at hoyra Guds orð!

Orsøkin til, at eg fór við, var, at ein av hinum professarunum í gudfrøði gekk til marxistiskar fundir fyri at gera næmingum sínum eftir vild.

„So kann eg eisini verða við til ein bønafund," hugsaði eg.

Á einum av hesum fundum møtti eg fyri fyrstu ferð hinum livandi Gudi. Eg hitti fólk, sum kendu Jesus persónliga, og eg hoyrdi vitnisburðir frá nøkrum, ið høvdu eina livandi trúgv á Frelsara sín. Eftir at eg hevði gingið til hesar fundir í umleið eitt ár, gav eg Jesusi lív mítt.

Gjøgnum hesar fundir kom eg at sanna, at tað stóð illa til hjá mær. Eg átti ikki lut í hesum, sum hesi livandi trúgvandi áttu lut í.

Á einum av fundunum var ein innbjóðing givin til teirra, ið „vildu byrja at trúgva á Jesus"? Men eg hugsaði, at innbjóðingin var ikki til mín. Eg metti meg framvegis vera trúgvandi. Av náði Guds gav fundarleiðarin innbjóðingina eina ferð afturat. Hesa ferð málbar hann seg øðrvísi:

„Var tað nakar, ið vildi geva Jesusi lív sítt?"
Tá varð eg greið yvir, at kallið júst var til mín. Jesus tók ímóti mær í náði Síni. Tó visti eg júst tá ikki so nógv um Hann.

## Uppfylt lyfti

Ein mánað seinni hoyrdi eg ein vitnisburð um ein trúgvandi í Nepal, sum var settur fastur fyri trúgv sína. Hetta var ikki fyrstu ferð, eg hoyrdi um hann. Men tá ið eg hoyrdi, hvat hann hevði sagt, tá ið hann stóð fyri rættinum, hevði eg ilt við at trúgva tí. Tað var ómøguligt, at hann kundi hava sagt slíkt. Men við eitt kom ein onnur hugsan til mín:

„Hetta merkir, at Markus 13.11 er gingið út." Har stendur jú:

*„Táið tey nú leiða tykkum fram og geva tykkum upp, stúrið tá ikki frammanundan fyri, hvat tit skulu tala! Tað, sum tykkum verður givið í somu stund, skulu tit tala; tað eru jú ikki tit, ið tala, men Heilagi Andin."*

Henda hugsan var í sjálvum sær eitt undur. Tí uppfylt lyfti finnast ikki hjá einum søgukritiskum gudfrøðingi. Men nú fekk eg at síggja, at hetta lyftið gekk út, og tá fall alt upp á pláss. Putlispælið vísti eina mynd av hinum livandi Gudi.

Gudurin hjá søgukritisku gudfrøðini er sum kenda standmyndin av hinum trimum apunum. Tann fyrsta apan heldur fyri eyguni, tann næsta fyri oyruni og tann triðja fyri munninn. Gudurin hjá søgukritisku gudfrøðini kann hvørki síggja, hoyra ella tala. Og av tí at hendurnar verða nýttar til at halda fyri eygu, oyru og munn, kann hann heldur ikki gera nakað.

Men eg fekk at sanna, at tann Gud, ið vit trúgva á, er ein livandi Gud. Tá ið Hann sigur okkurt í orði Sínum, so stendur tað fast.

Tann næsta hugsanin, ið sló meg, var:

„Um lyftið var satt? Hvussu so við undurverkunum? Eg hevði undirvíst í teimum og hevði sagt, at tey vóru ósonn. Eg hevði verið blindum ein blindur vegleiðari."

## Professari á bíbliuskúla

Tá ið tað nú gekk upp fyri mær, at eg einki visti, avgjørdi eg, at eg skuldi læra nakað og fór á bíbliuskúla. Eg fari aldri at gloyma mín fyrsta tíma á bíbliuskúlanum. Vit vóru 20 næmingar í flokkinum. Tann yngsti var 16 ár. Tann elsti var ein omma í 60-unum. Mitt ímillum teirra sat eg – professari dr.theol.

Vit høvdu ein ungan bíbliulærara, ið var umleið 30 ára gamal. Hann útlegði Sálm 119. Eg var heilt ovfarin av at hoyra, hvat hann hevði at bera fram. Hvussu visti hann alt hetta? Eg, sum var professari, hevði onga hóming av tí, ið hann tosaði um. Sum frá leið, fekk eg frágreiðingina. Hann kom til vers 99, har skrivað stendur:

*„Eg eri vorðin klókari enn allir lærarar mínir; tí eg grundi á vitnisburðir Tínar."*

„Tað er júst hatta, ið er hent honum," hugsaði eg.

Tá ið eg var vorðin betur kend á bíbliuskúlanum, greiddi rektarin mær eitt sindur frá hesum læraranum, Mike.

„Mike hevur ikki verið her so leingi," segði hann. „Hann er kanska ikki tann lærdasti; men hann lesur Bíbliu sína. Hann etur Bíbliu sína. Hann livir í Bíbliu síni. Og tá ið hann letur munnin upp, er tað Guds orð, ið flýtur yvir."

Eg var til tímarnar á hesum bíbliuskúlanum so ofta, eg kundi. Mánadag, týsdag og hósdag hevði eg sjálv fyrilestrar á universitetinum, men mikudag og fríggjadag gekk eg á bíbliuskúlanum.

Skjótt byrjaði eg av nýggjum at lesa orð Guds. Nú var Jóhannes 3.16 ikki longur eitt avoldað orðafelli frá einum hissini gudfrøðingi í fyrstu øld. Hetta er frelsulyfti Guds, ið eg kann líta lív mítt á:

*„Tí so elskaði Gud heimin, at Hann gav Son Sín, hin einborna, fyri at hvør tann, ið trýr á Hann, skal ikki fortapast, men hava ævigt lív."*

Týtt úr norskum – JíS


**GÓÐ TÍÐINDI** NR. 3

Útgevari: Góð Tíðindi
Konto í Betri: 9181 5604941
Ábyrgd: John í Skemmuni
Umbrot: Else Sjúrðaberg
Prent: Føroya Prent
Blaðið verður sent øllum húskjum ókeypis og kann lesast á evr.fo
*Tøkk fyri forbøn og stuðul.*


## Winston Churchill (1874-1965) um Bíbliuna

Stóri forsætisráðharri Bretlands, søgufrøðingur, rithøvundur og Nobelprísvinnari í bókmentum, sigur:

„Vit afturvísa við andstygd øllum hesum lærdu og uppsnissaðu lygisøgunum um, at Móses bert var eitt sagnmenni. Vit halda, at vísindaligasti og skynsamasti hugburðurin er at taka søguligu frásagnir Bíbliunnar bókstavliga.

Vit hava orsøk til at trúgva, at hesir løgnu tilburðir vórðu endurgivnir álítandi og vórðu varðveittir niður ígjøgnum tíðina við nógv størri umsorgan enn mongu snarskrivaðu frásagnirnar um hendingar á okkara døgum.

Vit kunnu vera vís í, at alt hetta hendi júst soleiðis, sum tað stendur skrivað í hini heiløgu Skriftini!

Vit hvíla trygt á Skriftarinnar óvikandi kletti!"

JíS týddi úr „Bibelen gennem tiderne"

# Vitnisburður

**Gunnar Nielsen**



Gunnar Nielsen er uppvaksin í Kvívík. Hann er sonur Jonnu og Sunleif Nielsen og er mittastur av trimum systkjum. Pápin, sum var úr Kvívík, andaðist í 2016. Mamman er úr Fuglafirði.

Barnaárini í Kvívík vóru góð í einum góðum og tryggum heimi. Har hevði hann eisini eina ommu at fara til. Sum onnur børn á bygd spældi Gunnar í haga og fjøru. Hann gekk 7 ár í barnaskúla í heimbygdini og fór síðan til Vestmannar í framhaldsdeild.

Gunnar hevur frá barni av spælt fótbólt. Hesin áhugin kom frá familjuni í Fuglafirði, har hann ofta var og vitjaði. Omman og abbin búðu tætt við fótbóltsvøllin, og familjan íðkaði nógvan ítrótt, serliga fótbólt.

Um sæð verður burtur frá kappróðri, var ikki nógvur ítróttur í Kvívík. Gunnar vildi sleppa at spæla fótbólt, og tí fór hann 8 ára gamal til Havnar at spæla við B36. Hann fór við bussi til Havnar, og eftir venjingina fór hann heim aftur til Kvívíkar við pápanum, sum arbeiddi í Havn.

Tá ið Gunnar var liðugur við 10. flokk í 1994, var ikki lætt at fáa arbeiði. Tí avgjørdi hann at fara til Havnar í skúla, og avgerðin fall á Handilsskúlan í Marknagili. Haðani tók hann hægri handilsskúlaprógv í 1997.

Tá ið Gunnar var byrjaður á handilsskúlanum, fór ítrótturin at taka meiri og meiri tíð, og tí valdi hann at flyta til Havnar ársskiftið 94/95. Hann fekk kamar til leigu á Næmingaheiminum undir Fjalli.

Meðan hann gekk á handilsskúlanum, kom hann at kenna Hannu Christiansen, sum hann giftist við í 1997. Hon er námsfrøðingur.

Hanna og Gunnar búsettust í íbúð hjá verforeldrunum á Argjum, og tá ið Gunnar fór niður til Danmarkar at lesa búskaparfrøði, búðu tey í Keypmannahavn. Í 2007 bygdu tey í Hoyvík og hava búð har síðan tá. Tey eiga 4 børn: Andrew, Símun, John og Eimi.

Gunnar hevur fyri ein stóran part starvast sum fíggjarráðgevi og grannskoðari. Hann hevur verið fíggjarstjóri hjá Bakkafrost og norska alifelagnum Salmar. Síðan november 2022 hevur hann verið stjóri í Effo.

## Gunnar greiðir soleiðis frá umvending síni

Tá ið eg sum smádrongur fór til Havnar at spæla fótbólt, fekk eg vinmenn, sum høvdu ein fyrimyndarligan atburð. Prátið við teir og atburður teirra hevði góða ávirkan á meg, hóast eg ikki minnist, at vit tosaðu um nakað andaligt.

Í 1994 var eg liðugur við fólkaskúlan og byrjaði sama ár á handilsskúla í Havn. Tá fekk eg ein vinaskara, sum eisini við fyrimyndarligum atburði og málburði fekk meg at hugsa um stóru spurningar lívsins og um meiningina við lívinum.

Ítrótturin kravdi nú meiri og meiri av míni tíð. Eg kom at spæla á besta liðnum hjá B36, og fleiri á liðnum vóru trúgvandi.

Á sumri í 1995 fóru vit til Suðuroyar at spæla dyst. Á veg suður við Smyrli hoyrdi eg fyri fyrstu ferð ein persónligan vitnisburð. Tað var ein liðfelagi, sum vitnaði um umvending sína. Hann greiddi frá, hvussu hann var komin til trúgv, og at neyðugt var at taka støðu til Jesus Kristus.

Hetta var kollveltandi fyri meg, og vitnisburður hansara vakti nakað í mær. Frá hesum kvøldinum var eg nógv ávirkaður av tí, sum eg hevði hoyrt, og syndabyrðan lá tung á mær.

Umleið eina viku seinni – um jóansøkuleitið – fekk eg ein persónligan spurning frá einum vini: „Gunnar, ert tú frelstur?“ Eg svaraði nei. – Sum vit samtalaðu um hetta, endurgav hann nøkur vers fyri mær – m.a. Jóhannes 3.16 – og ígjøgnum hesa samtalu kom eg til persónliga trúgv á Jesus Kristus.

Frammanundan hevði eg havt ta hugsan, at eg mátti gera nakað sjálvur. Men nú sá eg, at Jesus var deyður fyri syndir mínar, og at eg ikki kundi gera nakað sjálvur. Jesus hevði fyri umleið 2000 árum síðan gjørt alt, sum skuldi gerast, og at hjá mær var bert at taka ímóti frelsuni sum eini gávu.

Eg bað eina bøn, har eg játtaði synd mína og bað Jesus um at frelsa meg. – Hetta var ein still og friðarlig hending. Hetta kvøldið fekk eg frið og upplivdi, at syndabyrðan, ið eg hevði borið og strevast við í eina viku, var tikin burtur.

Eg fór so heim til Kvívíkar í summarfrí. Eg fekk eitt Nýggja Testamenti við mær, sum eg las, alt sum tað var. Eg skilti ikki alt, sum eg las, men eg fekk tó nógvar grundleggjandi sannleikar við, bæði viðvíkjandi frelsuni og lívinum hjá einum trúgvandi. – Hesir sannleikar góvu mær ein tosta eftir at læra meir.

Tá ið eg kom aftur í skúla eftir summarfrítíðina, kendi eg tað, sum eg var við eitt vegamót. Eg fór nú á 18 ára legu á Zarepta. Tá ið eg kom inn í salin og hoyrdi tey ungu syngja, minnist eg, at henda hugsan kom til mín: „Gunnar, er tað veruliga her, tú hoyrir heima?“ Eg kendi hetta sum ein andaligan bardaga og eitt álop. Eg kom jú frá aðrari átrúnaligari bakgrund, og hetta var mær fremmant, og eg mátti taka eina støðu. Eg setti mær sjálvum ymiskar løgnar spurningar og kendi tað trupult. – Men hóast hetta, so kendi eg meg heima í hesum felagsskapi.

Komin aftur av Zarepta, og vanligi skúladagurin byrjaði aftur, kendi eg, at eg hevði brúk fyri onkrum at styðja meg til. Eg fór til ein skúlafelaga, sum eg visti, gekk á møti, fyri at tosa við hann um mínar andaligu spurningar.

Eg fór síðan á møti í Ebenezer, og har fekk eg nógvar nýggjar vinir. Eg kom í ein bíbliubólk, og vit vóru nakrir, sum saman gingu ígjøgnum eitt Emmaus skeið. Soleiðis fekk eg eitt andaligt samfelag, sum var gott og menn-andi fyri meg.

Nú fór eg at hugsa um dóp. Men vinir mínir heittu á meg fyrst at kanna, hvat orð Guds sigur um spurningin. Teir vildu ikki leggja trýst á meg, men at eg sjálvur bleiv sannførdur út frá orði Guds. Eg avgjørdi tí – tá ið eg í 1996 fór í summarfrí – at eg skuldi lesa alt, sum Nýggja Testamentið sigur um dóp. Við at gera hetta kom eg sjálvur til ta sannføring, at eg átti at lata meg doypa, og hetta fór fram í august sama ár.

Tá ið eg í dag hugsi um alt hetta, so skilji eg, at Harrin hevur virkað í lívi mínum heilt frá barni av. Hann hevur brúkt dreingir, sum høvdu ein góðan atburð, at ávirka meg andaliga. Síðan gav Harrin einum dreingi dirvi at luta sín vitnisburð við meg umborð á Smyrli. Og Harrin gav einum vini dirvi at spyrja meg, um eg var frelstur.

Hetta er ein áminning um, hvussu týdningarmikið tað er, at vit, sum eru komin til trúgv, liva rætt og ikki skammast at vitna fyri øðrum. – Tað var júst hetta, sum var við til at leiða meg til persónliga trúgv á Harran Jesus.

Eg eri ómetaliga takksamur fyri, at eg lærdi Harran Jesus at kenna sum Frelsara mín, tá ið eg var ungur. Hann hevur verið mær góður og hevur signað okkum.

***

Ynski mítt er, at tú, sum lesur henda vitnisburð, skalt koma at kenna Jesus sum Frelsara tín. – Hann er góður at hava sum vegleiðara í lívinum, og Hann leiðir okkum ígjøgnum alt, til vit eru komin inn í hin himmalska staðin.

# 7-tals prógvið í Bíbliuni

Tá ið russiski støddfrøðingurin og gudsnoktarin, Ivan Panin, doktari, setti sær fyri at lesa Bíbliuna á hebraiskum og grikskum við tí endamáli at eftirkanna, um nakað hald var í tí, sum tey kristnu tosaðu um við so stórum sjálvsáliti, varnaðist hann – við støddfrøðiligum útrokningum – at Bíblian ikki kundi vera komin fram av mannaávum. Hann rakti við, at teksturin í Bíbliuni hevði talvirði, og at talið 7 skaraði framúr.

| | |
|---|---|
| 490 orð | 70 ferðir 7 |
| 49 setningar | 7 ferðir 7 |
| 1162 sjálvljóð | 166 ferðir 7 |
| 917 hjáljóð | 131 ferðir 7 |
| 98 sagnorð | 14 ferðir 7 |
| 77 navnorð | 11 ferðir 7 |
| 70 sambindingarorð | 10 ferðir 7 |
| 49 fyrisetingar | 7 ferðir 7 |
| 126 persónsfornøvn | 18 ferðir 7 |
| 70 kenniorð | 10 ferðir 7 |
| 49 fornøvn | 7 ferðir 7 |
| 91 orð vísa á persónar í guddóminum | 13 ferðir 7 |
| 7 orð vísa á Gud Faðir | |
| 7 orð vísa á heimin | |

Ivan Panin las fyrsta setningin í Bíbliuni á hebraiskum:

*„Í upphavi skapti Gud himmal og jørð."*

Hann sá, at setningurin hevur 7 orð og 28 bókstavir (7 ferðir 4). Hann varnaðist, at *„Gud"*, *„himmal"* og *„jørð"* høvdu øll talvirðið 14 (7 ferðir 2). Hann royndi at seta tað hebraiska kenniorðið afturat, men fekk sama úrslit. Síðan tók hann fyrsta og seinasta bókstavin í orðunum og fekk talvirðið 133 (7 ferðir 19). Fyri at royna okkurt tilvildarligt tók hann talið á tí fyrsta, mittasta og síðsta bókstavinum í øllum teimum 7 orðunum og fekk talið 1393 (7 ferðir 199). Hann helt fram við tí sætta og sjeynda orðinum, og úrslitið av teimum var eisini 7.

Ivan Panin sá, at hann var um at verða við undirlutan á sínum egna øki. Hann visti, at hetta kundi ikki vera tilvildarligt. Sambært teimum støddfrøðiligu reglunum kundi ein slík tilvild bert koma fyri í einum av 823.543 førum. Hann helt á at lesa og sá, at tað sama var galdandi í øðrum versi:

*„Jørðin var oyðin og tóm …"*

Úrslitið varð tað sama í triðja versi og í øllum hinum versunum í fyrsta kapitli.

Ivan Panin kom eftir, at Bíblian – íroknað allar ættartalvurnar – ikki bert var vanligur tekstur, men var eisini skrivað í einum 7-tals mynstri.

Hann sendi boð eftir tveimum vinum, sum vóru kønir í hebraiskum og grikskum máli. Teir noyddust at arbeiða saman í 13 vikur – við at nýta alfrøðir (leksikon) og útrokningar sum hjálparamboð – til tess at orða *ein* setning á hesum báðum málunum eftir 7-tals mynstrinum.

Hetta, sum Ivan var vorðin varur við, leiddi hann til umvending. Hann visti nú, at Bíblian er ikki vorðin til av tí kunnleika, sum lærdir menn høvdu til grikskt, hebraiskt og støddfrøði, men at hon var skrivað av heilagum monnum – frá kongum til bøndur og frá hirðum til fiskimenn. Hon er ikki vorðin til við eitt skrivaraborð við at nýta alfrøðir og útrokningar, men var skrivað yvir eitt umleið 1600 ára langt tíðarskeið av okkurt um 40 leikum og lærdum monnum. Hesir menn kendu ikki hvør annan og livdu langt frá hvør øðrum, men teir høvdu eitt til felags – teir vóru gudsmenn og vóru drivnir av Heilaga Andanum.

Ivan Panin kunngjørdi tað, sum hann hevði rakt við, í tíðindablaðnum New York Sun og prógvaði tað út frá fyrsta kapitli í Nýggja Testamenti, sum byrjar við ættartalvu Jesusar – ein langur listi av nøvnum.

Hann skrivaði m.a.:

„Fyrsti parturin av ættartalvuni inniheldur 49 orð (7 ferðir 7). Orðini eru sett saman av 266 bókstavum (7 ferðir 38). Har eru 42 navnorð (7 ferðir 6), og av hesum eru 35 sernøvn (7 ferðir 5). Av teimum 35 sernøvnunum eru 28 mannfólkanøvn (7 ferðir 4) – hini 7 eru konufólkanøvn."

Panin umrøddi eisini frásøgnina um Jesu føðing, sum stendur skrivað í versunum 18 til 25 í sama kapitli. Í hesum versum eru 161 orð (7 ferðir 23), og úrslitini av talvirðunum í hesum orðum kunnu eisini býtast við 7.

„Roynið at skriva eina líknandi frásøgn við 161 orðum á tykkara egna máli og eftir sama støddfrøðiliga mynstri," segði Ivan. Hann visti, at tað var ógjørligt. „Og leggið tykkum síðan í geyma," skrivaði hann víðari, „at tað sama ger seg galdandi í hinum kapitlunum, heilt til seinasta kapittul hjá Matteusi, sum endar við 7 orðum, sum hann ikki hevur nýtt áður. Hetta heldur fram hjá Markusi, Lukasi og Jóhannesi."

Einaferð beyð hann alment 9 kendum rationalistum – onkrir vóru professarar í gudfrøði, tríggir vóru prestar frá ymsum trúarsamfeløgum, og ein var blaðstjóri – at vísa aftur *hesa sannroyndina*, sum hann var komin fram á, og helst er tað haðani, at uppseting hansara av bøn Jesusar í Jóhannesi 17. kapitli er at finna. Uppseting hansara av grikska grundtekstinum sæst í talvuni omanfyri.

Eingin av mótstøðumonnunum kundi vísa hesum aftur. Teir viðgingu eisini, at tað vóru 7 bønir í faðirvár, at Jesus talaði 7 ferðir á krossinum, at Hann gjørdi 35 undurverk og segði 35 líknilsi. Teir boygdu seg eisini fyri, at bøkurnar í Bíbliuni eru ikki 66, men 63 (9 ferðir 7), tí Sámuels- Konga- og Krønikubøkurnar eru ikki býttar sundur í tvær í tí hebraisku Bíbliuni.

„Og gloymið ikki," ljóðaðu seinastu orð Ivan Panins, „at 7 persónar eru vaktir upp frá deyðum. Tveir í Gamla Testamenti og fimm í Nýggja Testamenti."

Ivan Panin, doktari, nýtti 50 ár av lívi sínum til at gjøgnumganga alla Bíbliuna og skrivaði 43.000 síður, sum prógva, at Bíblian, øll, sum hon er – heilt frá fyrstu Mósebók til Opinberingina – er skrivað í hesum 7-tals mynstri.

Apokrýfurnar, Koranin og aðrar bøkur eru sjálvsagt eisini kannaðar fyri at vita, um sama úrslit fekst, men eingin av teimum stóð hesa royndina.

***

Í seinna brævi Paulusar til Timoteus (2. Tim. 3.16) stendur:

*„Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing, til uppfostran í rættvísi, so gudsmenniskjað kann verða fullkomið, ført fyri at gera alt gott verk."*

(Keldur: Grein á vp.fo eftir Birgir Jakobsen í febr. 2023; www.bible-facts.info; „Er Bíblian álítandi" eftir Arthur Gook; Grein í Sosialinum nr. 27, 8. febr. 1996.)